# EIN SKÚLADAG

**HÚSAR - Lat vera! Ikki stinga høvdið niður í bókina. Tí so kann eingin síggja hesa vøkru myndina, sigur Óli. Hann hevur savnað tveir av skúlafelagum sínum rundan um seg. Beint nú er tað hann sum er lærari teirra og hann sum teir skulu líða og lýða á, her á aftasta beinki í Húsa skúla**



ÁHUGAMÁL

*Óli í Lon (uttast høgrumegin) hevur nógv áhugamál, m.a. dámar honum væl at savna steinar. Men serligan áhuga hevur hann fyri djóralívinum. Og ta vitanina deilir hann fegin við floksfelagar sínar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Snorri Brend

– Hvat er hatta fyri eitt djór?, vil annar teirra hava at vita.

Teir tykjast sera áhugaðir í lítlu bókini á donskum máli, við tí forvitnisliga heitinum »Dyrenes Lexikon«.

Hetta er ein einfaldur spurningur hjá 12 ára gamla Óla í Lon at svara uppá, tí hetta er barnalærdómur fyri hann.

Svar hansara kemur beinanvegin:

– Hatta er ein sjóhestur. Og vita tit hvat ...?, greiðir hann víðari frá.

Hinir báðir lurta við andakt.

– Tað sjáldsama við sjóhestinum er, at tað ikki er honin sum ber eggini. Nei, tað er faktist hannurin sum ger tað. Hygg her, her ein mynd av tí.

Óli hevur fangað forvitnið hjá hinum báðum. Annar hevur hug at stinga nøsina heldur langt fram. Men tað fær hann altso beinanvegin at hoyra fyri.

Og hann er skjótur at geva pláss, soleiðis at allir kunnu fáa tað sama við.

Lærarin letur bara teir tríggjar ordna viðurskiftini innanhýsis. Tað læra teir helst eisini okkurt av.

**Tað er tó ein drongur sum ikki situr og skrivar hesa løtuna. Tað er Óli**

### Stjóratíð

Hetta er ein vanligur mikudagur á Húsum. Lítið fólk er at síggja í bygdini henda heldur gráa morgunin

Onkur bilur er júst farin gjøgnum bygdina, í samband við fráferðina hjá Sam av Syðradali. Annars andar alt av friði í lítlu og hugnaligu bygdini her á Kalsoynni.

Eisini í Húsa skúla var friður fyri eini løtu síðani og ikki ein nemingur at síggja ella hoyra. Men tað kann jú ikki vara leingi aftrat ein slíkan morgun.

Klokkan er nakrar minuttir í 11, og nú byrja børnini so smátt at finna pláss síni við skúlaborðunum til dagsins fyrsta tíma.

Hetta kann tykjast sum eitt slag av stjóratíð, tá børnini fara so seint í skúla. Men hetta hevur sjálvandi sína frágreiðing.

### Aftasti bonkur

Fyrr um morgunin var allur tann sjey næminga stóri skúlin farin um Kalsoyarfjørð til Klaksvíkar at vitja heilsusystrina.

Tá hetta var fingið frá hondini, var leiðin aftur løgd umborð á strandfaraskipið Sam sum førdi tey heimaftur.

Eftir eitt langt fríkorter, har børnini kundu støkka inn á gólvið heima við hús til ein drekkamunn, byrjaði skúladagurin við skriving.

Líkt er til, at hetta er nakað sum teimum dámar væl, tí her hoyrist ikki eitt kis. Øll sita líka hugagóð og skriva.

Í einum horni á aftasta beinki sita tveir dreingir líð um líð so hugagóðir og skriva. Teir lata ikki við seg koma um tað sum hendir við hitt borðið.

Teir hava helst størri áhuga fyri skrivingini, enn djóraheiminum.

*Stuttsøgan »Ein skúladagur í K«, sum mong tilkomin munnu kenna,*